# Eg vil verða reinsaður

*Løgmaður loysti í gjár Signar á Brúnni út starvinum sum landsstýrismaður. Signar á Brúnni hevur heitt á løgmann um at seta kanningarstjóra at kanna viðurskiftini, tí Signar á Brúnni metir seg einki skeivt hava gjørt*



Signar á Brúnni, fyrrverandi landsstýrismaður, vil verða reinsaður - og so aftur í landsstýrið

DAGFINN OLSEN

- Lat meg undirstrika, at eg meti meg einki skeivt hava gjørt.

Hetta var fyrsta viðmerkingin hjá Signari á Brúnni, eftir at hann í gjár fór frá sum landsstýrismaður, orsakað av fíggjarligu viðurskiftunum í Sjónvarpinum.

- Eg kann leggja afturat, at embætisverkið hjá mær og í Fíggjarmálastýrinum hava gjørt sær stóran ómak í hesum málinum og tað er væl lýst í tilfarinum, ið fór til Landsgrannskoðaran, sigur Signar á Brúnni.

**Eg vil verða reinsaður**

Um tað, at hann nú fer úr starvinum sum landsstýrismaður, sigur Signar á Brúnni, at málið er blást upp.

- Tá eg havi tikið hetta stig, so er tað tí, at málið av onkrari orsøk er blást meira upp, enn onnur mál. Eg veit ikki hví. Men við tað, at skuldsetingar hanga í luftini um ymiskt, so sigur tað, at hesum kann eg ikki liva við ella finna meg í. Tí vil eg hava eina kanning gjørda um viðurskiftini, so tey verða lýst út í æsir, so at hesar skuldsetingar ímóti landsstýrinum í nærum øllum málum, ið koma frá landsgrannskoðaranum, halda uppat, sigur Signar á Brúnni.

- Eg vil verða reinsaður. Hetta má roynast einaferð, so hetta óskil, ið ofta er á økinum, kann steðgast. Hetta við at tingmenn skuldseta hvønn annan fyri líkt og ólíkt, sum so fer í fjølmiðlarnar, har eg meti hetta mál er sera einsíðugt lýst, sigur Signar á Brúnni.

**Ikki martyrur**

Spurdur, um hann er samdur við teimum, ið meta hann sum martyr í hesum málium, sigur Signar á Brúnni, at so er ikki.

- Um nakar heldur, at eg hugsi um at gera meg til martyr í hesum málinum, so er tað ikki so. Eg vil fyri einhvønn prís, at tað eg og embætisfólk gera, er reiðiliga gjørt. Og tað er tað eisini. Og so vil eg hava kanningarstjóran at seta fordømi, at siga,at so og so er tað. Hetta er ikki fyri at gera meg til martyr, leggur Signar á Brúnni dent á.

**Sannførdur**

*Tú hevur sagt teg úr landsstýrissessinum fyribils. Tað má vera tí, at tú metir, at møguleiki er fyri at venda aftur.*

- Tá kanningin er gjørd, so eri eg sannførdur um, at einki er at seta fingurin á í samband við mína embætisførslu. Tí helt eg, tá eg tosaði við mín flokk og við løgmann um hetta, at eg fór ikki at siga meg úr starvi og gera eina kanning, og kanningin síðani sigur, at eg havi einki skeivt gjørt, men so eri eg farin úr einum starvi orsakað av hesum. Eg meti, at kanningin kann gerast innanfyri nakrar fáar vikur, sigur Signar á Brúnni og leggur afturat, at løgmaður hevur sagt honum, at hann er vælkomin aftur í landsstýrið, tá kanningin er avgreidd og hann er reinsaður.

**Flokkurin ikki samdur**

*Tað tók drúgva tíð at við-gera málið innanhýsis í Tjóðveldisflokkinum. Er flokkurin samdur í hesum og stuðlar hann tær?*

- Flokkurin er ikki samdur í hesum málinum. Men flokkurin hevur viljað hetta, um enn ikki allir hildu hesa loysn vera neyðuga, sigur Signar á Brúnni, sum nú aftur tekur sæti á tingi, har Torbjørn Jacobsen hevur sitið í hansara stað.

Signar á Brúnni hevur sagt seg úr landsstýrissessinum fyribils, so hann kann venda aftur, tá hann er reinsaður og hann tykist avgjørdur og ivaleysur í, at hetta verður úrslitið av eini kanning av viðurskiftunum.

Landsstýrismaðurin Høgni Hoydal røkir nú málsøkini hjá fráfarna landsstýrismanninum.

# Roknistykkið var eitt arbeiðsskjal

*Danski fíggjarmálaráðharrin, Mogens Lykketoft, vísir í svari til fyrispurning frá Jóannesi Eidesgaard á, at yvirlitið yvir útreiðslur av føroyingum ikki kann lesast sum politisk sjónarmið*



*Mogens Lykketoft vísir á, at roknistykkið um útreiðslur av føroyingum bert var eitt arbeiðsskjal*

JOHN JOHANNESSEN

Yvirlitið yvir útreiðslur av føroyingum, danska stjórnin legði fyri landsstýrið á samráðingarfundinum um ríkisrættarligu støðu Føroya 17. mars, var eitt arbeiðsskjal, sum landsstýrið skuldi gera sínar viðmerkingar til.

Talan var ikki um eitt krav frá donsku stjórnini um, hvørjar útreiðslur føroyingar skulu taka yvir, fáa vit fullveldi.

Hetta vísir danski forsætisráðharrin, Mogens Lykketoft, á í svari til skrivligan fyrispurning, Jóannes Eidesgaard setti honum, beint eftir, at tølini vóru almannakunngjørd.

**Misskilt**

Mogens Lykketoft vísir á, at skjalið er misskilt í føroysku miðlunum. Orsøkin er, at skjalið er almannakunngjørt í Føroyum uttan tær viðmerkingar, landsstýrið gjørdi til skjalið, eftir at tað var komið á samráðingarborðið.

Skjalið varð bæði í Føroyum og í Danmark lagt fram sum eitt yvirlit yvir, hvat føroyingar kosta dønum. Víst var á útreiðslur av donskum pensjónum til føroyingar í Føroyum, og farið varð eisini so langt, sum at vísa á, hvørjar útreiðslur danir hava av føroyingum, sum hava fastan bústað í Danmark. Í hesum sambandi varð millum annað víst á dagpening, arbeiðsloysisstuðul og annað líknandi. Einki varð nevnt um skattainntøkur og annað av føroyingum í Danmark.

Tí spyr Jóannes Eidesgaard í fyrispurningi sínum, hvat endamálið er við roknistykkinum.

**Greið viðurskifti**

Mogens Lykketoft ger í svarinum til Jóannes Eidesgaard greitt, at lisitin er gjørdur fyri at gera greitt, hvussu býtið av útreiðslunum er í einari støðu, har føroyskt fullveldi merkir, at ríkisfelagsskapurin og felags ríkisborgararætturin heldur uppat.

Danski fíggjarmálaráðharrin sigur, at føroyskt fullveldi merkir serligan ríkisborgararætt, og eigur hetta at roknast upp í faktuella grundarlagi fyri skiftistíð.

Tó vísir Mogens Lykketoft á, at stjórnin hevur gjørt lagt sær í geyma, at landsstýrið ikki ynskir broytingar í hesum viðurskiftum, hóast Føroyar fáa fullveldi. Men samstundis sigur hann, at hetta er ein spurningur, samráðast skal um.

**Føroyingar hava týdning**

Mogens Lykketoft sigur í endanum í svarinum til Jóannes Eidesgaard, at stjórnin er samd við føroyingum í, at føroyingar búsitandi í Danmark geva nóg, bæði fíggjarliga og menniskjaliga til danska samfelagið.





*Tað er pláss fyri allari manningin samstundis við borði í lygarinum á Glyvrabergi*

**Mynd: Edvard Joensen**

# Glyvraberg fer at fiska háv

*Fimm ungir mans ætla sær at fiska háv við 50 tonsaranum Glyvrabergi úr Hvalba. Teir hava roynt tað við øðrum skipum fyrr*

EDVARD JOENSEN

Meðalaldurin er eini 25 ár hjá teimum fimm monnunum, sum fara við Glyvrabergi at fiska háv vestan fyri Føroyar. Hetta eru menn, sum summir hava verið við Fuglfirðingi, og onkur áðrenn ta tíð eisini við Skútunesi, og tí kenna eitt sindur til hesa veiðuna. Og veiðan er av slíkum slag, at tú skalt vera eitt sindur av einum »cowboy« fyri at fara undir hetta, sigur skiparin á Glyvrabergi.

Vit sita í lítla lugarinum á 50 tonsaranum úr Hvalba, sum júst er komin av beding í Vági, har hann er málaður og hevur fingið onkrar smávegis ábøtur omandeks.

Reiðarin tekur eitt krúss, sum hann stoytir eitt sindur av heitum vatni í, turkar innan úr við eini uppvaskibust og býður blaðmanninum kaffi. Vit sessast – hesir fimm ungu menninir – meðan reiðarin sleppur sær aftur á dekkið. Lugarið er lítið. Einar seks koyggjur, har onkur er full av óruddi, sum vanligt er.

»Tóm koyggja er altíð full«, sigur orðatakið.

Beint sum komið verður niður í gongina framman fyri lugarið, er kokkahúsið. Har standa nakrar grýtur og onkur panna. Í lugarinum er borð at skaffa á, og ein oljukabúss at halda hitanum í rúminum.

Andrias Johannesen, sum er skipari á Glyvrabergi, sigur, at teir fara undir hesa veiðuna, tí teir halda, at tað skal bera til, hóast okkurt bendir á, at stovnurin er í minking.

Sum er, er tað bara Fuglfirðingur, sum roynir eftir hávi undir Føroyum. Men okkurt er, sum bendir á, at hann fer at gevast við hesi veiðuni og helst leggja um til meira tradiotionellan fiskiskap.

Andrias Johannesen sigur, at hann heldur, at teir vóru ov nógvir mans við Fuglfirðingi til, at tað gav nakað í manspart. Við Glyvrabergi ætla teir tí ikki at vera fleiri enn fimm mans. Í Grundini er tað ein meira, enn upprunaliga ætlað.

Tað er ein serlig veiða, teir fara undir. Hávurin verður veiddur á rættiliga djúpum vatni, og krevur tí serligan reiðskap. Ikki tí. Hann verður veiddur á vanligari botnlínu, sum tó er væl tjykri, enn línan er á landgrunninum. Hendan línan er níggju mm. Eisini er neyðugt við peiliboyum fyri at finna aftur. Tað kemst av, sigur Andrias Johannesen, at tá roynt verður á so djúpum vatni, sum teir fara at gera, verða standararnir so langir, at boyan kann reka upp til einar tveir fjórðingar. Og tað kann vera í allar ættir, at hon liggur og melur. Tá kann tað skjótt gerast rættiliga umstendiligt at finna hana aftur.

Hesin reiðskapurin er ikki nakað, ein bara liggur inni við. So Andrias sigur, at teir hava gjørt íløgu í nýggjan reiðskap. Tann íløgan fer at liggja upp móti teimum 300.000 krónunum, sigur Andrias Johannesen, skipari á Glyvrabergi.

Sløgini, fyrr hevur verið fiskað eftir, eru glíggjhávur og skrubbhávur, og Glyvraberg fer at leggja seg eftir hesum somu sløgunum,siga teir í lugarinum. Teir ætla at leggja alt upp í Føroyum, skrædla og senda av landinum á franska marknaðin. Soleiðis fæst helst besti prísurin, siga teir. Livurin er stórur partur av hávinum, og hana ætla teir at selja til livravirkið í Leirvík, sigur Andrias Johannesen. Einki frystari er umborð, og tí krevja túrarnir at vera stuttir.

Glyvraberg fer nú at rigga til, og teir vænta at fara fyrsta túrin einaferð seinast í vikuni.

## Frá Yrkisfelag Studenta- og HF-lærara

Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara ger vart við, at avleiðingarnar av arbeiðsósemjuni millum Føroya Landsstýri og Føroya Lærarafelag gerast alsamt álvarsligari.

Yrkisfelagið harmast um, at landsstýrið á øllum økjum skerjir so nógv av játtanunum, at stovnarnir ikki fáa virkað eftir lógum, ið hóska í einum framkomnum samfelagi. Bert at samtykkja slíkar lógir uttan at játtanir fylgja við er ábyrgdarleyst.

Ásannast má, at skjótari er ofta at bróta niður enn at byggja upp og í hesum føri, gongur sjón fyri søgn: besta og mest gevandi undirvísingartíðin undan próvtøku fer fyri skeyti, og arbeiðslagið hjá næmingunum fer av lagi. Próvtøka og próvtøkuúrslit verða meira hótt fyri hvønn dag, og møguleikin at lúka treytirnar og at standa seg væl á miðnámsskúla minka í hvørjum, tí næmingarnir skuu í fyrsta lagi hava lokið fráfaringarroynd fólkaskúlans og í øðrum lagi við nóg góðum úrsliti fyri at verða tikin upp á miðnámsskúla.

Yrkisfelagið heitir staðiliga á landsstýrið um at halda landsins lógir og at virða arbeiðið, ið lærarar og næmingar gera.

## Programnevndir eru nú settar

*Ráðgevandi programnevndirnar hjá Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya*

Landsstýrismaðurin í mentamálum, Signar á Brúnni, hevur sett ráðgevandi programnevndirnar hjá Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya. Nevndirnar, ið hava felags formann eru settar sambært løgtingslóg nr. 22 frá 20. februar 1998 um kringvarp v. m. Uppgávurnar hjá nevndunum eru m.a.:

- tvær ferðir árliga at umrøða skráirnar hjá ávikavist Útvarpi og Sjónvarpi Føroya,
- at viðgera programvirksemið hjá almennu loftmiðlunum,
- at ráðgeva stjóranum við programvirkseminum.

Eisini kunnu nevndirnar koma við viðmerkingum til sendingar, ið hava verið í Útvarpi ella Sjónvarpi Føroya.

Ráðgevandi programnevndir hjá Útvarpi Føroya: Jonhard Mikkelsen, Vestmanna, er formaður í nevndini. Hinir nevndarlimirnir eru: Marna Jacobsen, Sandur, Óluvá Klettskarð, Klaksvík, Marita Rasmussen, Tórshavn, Jógvan Fríðriksson, Innan Glyvur. Ingi Rasmussen, Tórshavn og Magni Joensen, Fuglafjørður.

Ráðgevandi programnevndin hjá Sjónvarpi Føroya: Jonhard Mikkelsen, Vestmanna, er formaður í nevndini. Hinir nevndarlimirnir eru: Marjun Bæk, Kvívík, Annlis Bjarkhamar, Vágur, Kristianna Rein, Tórshavn, Bergur Poulsen, Fuglafjørður, Georg F. Hansen, Miðvágur og Rói Patursson, Tórshavn


GSM frá Føroya Tele



...so ert tú altíð har, tú skalt vera!

Vel tað GSM-haldið, ið hóskar best til tín...

Vanligt hald
1,40 kr./min. um kvøldið • Mánaðargjald: 115,00 kr.

Vinnuhald
1,60 kr./min. alt samdøgrið • Mánaðargjald: 200,00 kr.

Frítíðarhald
0,90 kr./min. um kvøldið • Mánaðargjald: 75,00 kr.

Vinnuhaldið
Til teirra, sum serliga brúka telefonina um dagin, og sum altíð vilja hava samband við viðskiftafólk og starvsfelagar. Eisini er hópurin av eykatænastum knýttur til haldið, t.d. SMS-tekstboð, vís nummar og dataflutningur.

| Kostnaður fyri vinnuhald | |
|---|---|
| Stovning | 700,00 kr. |
| Mánaðargjald | 200,00 kr. |
| Minuttgjald - dag | 1,60 kr. |
| Minuttgjald - kvøld | 1,60 kr. |
| Uppringingargjald | 0,40 kr. |

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo